UTTAN ÚR HEIMI

## Eisini í Bretlandi

Amerikanarar ætla sær ikki einans at nýta bretsku radarstøðina í Fyllingdale til ta ætlaðu rakettverjuskipanina, men teir ætla eisini at seta rakettir upp í Bretlandi, skrivar blaðið The Guardian.

Blaðið vil vera við, at amerikanarar hava havt samband við stjórnina í London hetta seinasta árið um ta ætlaðu útbyggingina. Sambært blaðnum skulu einar tjúgu verjurakettir, sum verða settar upp í Alaska, steðga fíggindarakettum úr eitt nú Norðurkorea, meðan rakettirnar, sum skulu setast upp í Bretlandi, skulu steðga rakettum frá fíggindum hjá USA í Miðeystri og Norðurafrika.

Bretland hevur fingið ein formligan fyrispurning úr USA um loyvi at sleppa at nýta radarstøðina í Fyllingdale, men The Guardian skrivar, at hetta er bara tað fyrsta stigið í amerikansku ætlanini á bretskari jørð.

## Samkynd skrásett

Kanningar hjá einari svenskari nevnd hava avdúkað, at trygdarløgreglan hevur skrásett næstan 240 starvsfólk í svenska útvarpinum og sjónvarpinum. Talan er um samkynd, fólk við rúsdrekka- ella rúsevnistrupulleikum og fólk, sum hava gjørt seg sek í einum ella øðrum lógarbroti.

Aðalskrivarin hjá kanningarnevndini, Fredrik von Arnold, sigur, at so seint sum í fjør vóru upplýsingarnar framvegis í goymslunum hjá trygdarløgregluni.

Kenneth Sundin, sum er talsmaður hjá svensku útvarps- og sjónvarpsfólkunum, sigur seg vera skelkaðan av upplýsingunum, sum eftir hansara tykki minna um jødaskrásetingina hjá nazistunum og skrásetingarnar hjá Stasi í gamla Eysturtýsklandi. Hann krevur nú, at viðurskiftini verða kannað til botns, og at starvsfólkini fáa at vita, hvørji tey eru, sum standa í skrásetingini.

## Ímóti rockarunum

19 kommunur í Norðursælandi hava saman við løgregluni og toll- og skattavaldinum gjørt av at fara í hernað ímóti rockarafelagsskapunum. Hetta er tað fyrsta veruliga skipaða átakið av hesum slagnum.

Ætlanin hjá stigtakarunum er bæði at forða fyri, at fleiri leita sær upp í rockarafelagsskapirnar og at avdúka tað ólógliga virksemið, sum felagsskapirnir fáast við. Ætlanin er at halda eitt sera vakið eyga við felagsskapunum Hells Angels og Bandidos og teirra stuðulsbólkum, Red&White og X-team.

Formaðurin í kommunufelagnum í Frederiksborg Amti, Finn Hansen, sigur, at ætlanin er at nýta somu mannagongd, sum amerikansku myndugleikarnir nýttu, tá teir avdúkaðu virksemið hjá kenda brotsmannakonginum Al Capone. Við hjálp frá toll- og skattavaldinum er ætlanin at kanna fíggjarligu viðurskiftini hjá øllum teimum, sum eru í rockarafelagsskapunum, ella sum myndugleikarnir hava illgruna um.

## Góð tímaløn

Norska blaðið Aftenposten skrivar, at formaðurin í Framburðsflokkinum, Carl I. Hagen, fekk 20.000 krónur aftur fyri at hava verið 18 tímar á fundi í býráðnum og í fíggjarnevndini í Oslo.

Blaðið hevur frá býráðnum fingið upplýst, at Carl I. Hagen var burturstaddur á 51 av teimum 54 fundunum, sum býráðið í Oslo hevur havt seinastu átjan mánaðarnar. Samanlagt var hann á einum fundi í fíggjarnevndini og á hálvum triðja fundi í býráðnum, skrivar blaðið.

Sjálvur heldur Carl I. Hagen ikki, at honum nýtist at møta á fundi í býráðnum, tí tað ber til at gera sína ávirkan galdandi, uttan at vera hjástaddur, sigur hann. Sambært Aftenposten er formaðurin í Framburðsflokkinum tann einasti politikarin, sum fær løn frá Stórtinginum, samstundis sum hann fær samsýning frá býráðnum í høvuðsstaðnum.

# Tað verður ein ófatilig vanlukka

**Eitt álop á Irak kann gerast ein ófatilig vanlukka fyri tað irakska fólkið, sigur aðalskrivarin í norska Reyða Krossi, sum júst hevur verið í Irak**

IRAK-KREPPAN
*Árni Joensen*



*Ein iraksk kvinna biður fyri friði. Sambært Reyða Krossi verður eitt kríggj ein ófatilig vanlukka fyri irakska sivilfólkið*
*Mynd: Reuters*

- Fólk eru bangin. Tey fyrireika seg til kríggj, men vóna, at málið skal fáa eina friðarliga loysn. Hesaferð eru tey ikki so væl fyrireikað til kríggj sum undir Flógvakrígnum í 1991, og tað verður ein ófatilig vanlukka, brestur kríggj á.

Tað sigur aðalskrivarin í norska Reyða Krossi, Jan Egeland. Fyrrakvøldið kom hann aftur til Noregs úr Irak, har hann hevur ferðast um ein stóran part av landinum. Tað var týðiligt, at líðingarnar hjá irakska sivilfólkinum høvdu havt stóra ávirkan á hann.

- Vatnið er longu dálkað, og verður kríggj, verður tað eitrað longu eftir teirri fyrstu náttini. Matvørugoymslurnar eru fáar, og møguleikin fyri stórum sivilum missi er stórur, sigur Jan Egeland.

Reyði Krossur er longu farin undir at fyrireika seg til, at eitt møguligt kríggj fer at raka irakska sivilfólkið meint. Norski aðalskrivarin sigur, at tað er umráðandi at fáa hjálpina fram sum skjótast, og tí er felagsskapurin farin undir at savna útgerð í grannalondunum hjá Irak.

- Vit fyrireika okkum til eitt tað størsta hjálparátakið nakrantíð. Lastbilar við teppum, vatni, tjøldum og aðrari neyðútgerð verða sendir hagar, tí alt skal fáast upp á plás tær næstu tvær-tríggjar vikurnar, sigur Jan Egeland.

Og vandin fyri kríggi veksur. Kanadiski uttanríkisráðharrin, Bill Graham, segði í gjár, at gongdin teir seinastu dagarnar kann ikki misskiljast, og Warren Bass, sum arbeiðir hjá stovninum fyri altjóða samskifti í Washington, sigur, at amerikanska stjórnin hevur komið sær í eina støðu, sum tað verður trupult at venda frá aftur.

# Stúra fyri kreppu í norsku oljuvinnuni

**Felagið hjá teimum norsku tøknifyritøkunum ber ótta fyri, at íløgurnar í norsku oljuvinnuni fara at minka nógv næsta ár, og at nógv fólk fara at missa arbeiðið**

OLJUÍDNAÐUR
*Árni Joensen*



*Helmingurin av teimum norsku oljupallunum liggja við bryggju ella eru í vinnu uttan fyri Noreg*

Norska stjórnin hevur í fíggjarlógini fyri næsta ár mett, at íløgurnar í oljuvinnuni verða 70 milliardir krónur, men nú sigur felagið hjá tøknifyritøkunum, at talið verður neyvan meiri enn helvtin av metingini hjá stjórnini.

Formaðurin í felagnum, Knut Aaneland, sigur, at tey norsku oljufeløgini eru farin at vísa størri áhuga fyri oljuleiðum aðrastaðni enn í Noregi. Hetta hevur havt við sær, at íløgurnar hjá teimum norsku feløgunum uttanlands eru nú tríggjar ferðir størri enn tær íløgur, sum feløgini gera heima í Noregi.

Umleið 250.000 norðmenn hava sítt dagliga arbeiði í oljuvinnuni ella hjá fyritøkum, sum eru knýttar at oljuvinnuni. Í seinastuni eru umleið 3.000 fólk uppsøgd ella hava fingið at vita, at tey kunnu vænta sær uppsagnarbræv, og umleið helmingurin av teimum norsku oljupallunum liggja við bryggju ella eru í vinnu uttanlands.

- Teir veruligu trupulleikarnir í vinnuni kunnu koma, áðrenn vit vita av, sigur Knut Aaneland.

Norski olju- og orkumálaráðharrin, Einar Steensnæs, heldur ikki, at tað ber til at tosa um eina kreppu í oljuvinnuni, men hann viðgongur, at orsøk er til at stúra.




TÓRSHAVNAR KOMMUNA



**Býlingshúsið á Ternuryggi**

Í Býlingshúsinum á Ternuryggi ganga 52 børn.

Stovnurin er skipaður við 2 barnagarðsstovum við 20 børnum í hvørjari og einari vøggustovu við 12 børnum.Á stovninum eru 12 starvsfólk.

Vit bjóða eitt áhugavert starv, har tú fært møguleika at gera tína ávirkan galdandi saman við hinum starvsfólkunum, og møguleika at skapa eitt mennandi umhvørvi fyri børnini

www.torshavn.fo

### Pedagogar til Býlingshúsið á Ternuryggi

Tórshavnar kommuna søkir eftir 3 pedagogum. Talan er um eitt starv 30 tímar um vikuna í barnagarðsstovu við 3-7 ára gomlum børnum, eitt starv í barnagarðsstovu 40 tímar um vikuna við 3-7 ára gomlum børnum og eitt starv í vøggustovuni 30 tímar um vikuna við 0-3 ára gomlum børnum. Størvini verða sett 1. mars 2003.

**Vit ynskja**
at tú hevur hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan gerandisdag, við virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum, foreldrunum og starvsfeløgunum. Dentur verður lagdur á, at tú kanst arbeiða sjálvstøðugt og megnar at taka avgerðir í tínum arbeiði.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið.

**Meiri fæst at vita**
um størvini við at venda sær til Heidi Henriksen, leiðara ella Hildur D. Samuelsen, varaleiðara tlf.318626.

**Umsókn**
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir, skal vera Býlingshúsinum á Ternuryggi, Turiðargøta 5.a, 110 Tórshavn í hendi í seinasta lagi mánadagin13. januar 2003.

TÓRSHAVNAR KOMMUNA



**Býlingshúsið undir Fjalli**

Í Býlingshúsinum undir Fjalli ganga 52 børn.

Stovnurin er skipaður við 2 barnagarðsstovum við 20 børnum í hvørjari og einari vøggustovu við 12 børnum.

Á stovninum eru 14 starvsfólk.

Vit bjóða eitt áhugavert starv í einum nærumhvørvi, har náttúran hevur ein stóran leiklut í gerandisdegnum.

www.torshavn.fo

### Pedagogur til Býlingahúsið undir Fjalli

Tórshavnar kommuna søkir eftir 2 pedagogum 30 tímar um vikuna í barnagarðstovum við 3 til 7 ára gomlum børnum. Starvið verður sett 1. mars. 2003.

**Vit ynskja**
at tú hevur hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan gerandisdag, við virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum, foreldrunum og starvsfeløgunum. Dentur verður lagdur á, at tú kanst arbeiða sjálvstøðugt og megnar at taka avgerðir í tínum arbeiði.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið.

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Katrina Joensen, leiðara, tlf. 314665 ella Katrina Petersen, samskipara, tlf. 31 51 60.

**Umsókn**
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir, skal vera , Býlingshúsinum undir Fjalli, Fjalsgøta 25, 100 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi mánadagin 6. januar 2003.

**Tónleikatilboð**

**OVATION Guitarar**

OVATION er guitarurin allir amerikumenn síggja upp til. Nevnast kunnu millum annað Shania Twain, Toto, Pink, Pantera, The Scorpions, Megadeth, Alicia Keys, Bbmak, Starz, Cyndi Lauper, Melissa Etheridge og DJ Ashba (ársins guitarleikari California), ið nýta henda framúr góða guitar

Nú er OVATION komin til Føroya í stórum stíli, men til ein sera lítlan prís






EIn betri loysn
ELDING
SMS – Tel. 319697 • Saltangará – Tel. 449697 • Klaksvík – Tel. 479697

**Frá Suðuroyar Sparikassa**

*Vit ynskja viðskiftafólkið okkara*

***eini gleðilig jól***
***og***
***eitt gott nýggjár***

*og takka fyri gott samstarv í brátt farna*

SUÐUROYAR SPARIKASSI

Lesið Sosialin

Vit ynskja øllum viðskiftafólki gleðilig jól og eydnuberandi nýggjár

Skrivstovan er afturlatin fríggjadagin 27., mánadagin 30. og týsdagin 31/12 . Átroðkandi boð verða avgreidd á tel. 311111

Føroya Lívstrygging
Kopargøta 1, postboks 206, FO-110 Tórshavn,
Tel. 31 11 11 · Fax 35 11 10 · T-postur: liv@livstrygging.fo - www.liv.fo